# Føroyski dansurin á veg fram

**Tað staðfesti Rasmus Joensen, formaður í Sláið Ring, á pallborðsfundi í Miðlahúsinum í gjárkvøldið. Fundurin, við heitinum »Brúðardansur og Brúdleypssiðir«, savnaði út við hundrað fólk**



Í panelinum sótu frá vinstru Rasmus Joe

PALLBORÐSFUNDUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyri trimum árum síðani skrivaði Sláið Ring, landsfelagið hjá dansifeløgunum í Føroyum, út eina kapping um at yrkja eina nýggja brúðarvísu. Inn komu átta vísur, men eingin varð mett nóg góð til at vinna tær 50.000 krónurnar, ið vóru virðisløn fyri vinnandi vísuna.

Landsfelagið hevur tó ikki slept tema'inum, og soleiðis framvegis áhugað í at yrkt verður ein nýggj brúðarvísa.

Í gjárkvøldið skipaði landsfelagið so fyri einum pallborðsfundi í Miðlahúsinum, har evnið var brúðardansur og brúdleypssiðir. Við pallborðið sótu Magnus Magnussen, ið er vanur at skipa fyri borðhaldum, Theodor E. D. Olsen, prestur, Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, og Rasmus Joensen, formaður í Sláið Ring.

Magnus Magnussen legði fyri og hugleiddi um brúdleypsborðhald og teir siðir, ið eru knýttir at hesum. Sjálvur er hann eisini kvøðari og hevur skipað manga brúðarvísuna, og tí nam hann eisini við hendan partin av brúðarveitsluni.

Hann helt seg mest til føroysku brúðarvísuna, »Várharra hann segði«, og metti út frá royndum, at frægast var ikki bæði at skipa fyri borðhaldi og at skipa brúðarvísuna.

- Gongur borðhaldið væl, er tú uppi at koyra av tí og fær illa konsentrera teg um brúðarvísuna aftaná, og gongur borðhaldið hinvegin illa, ávirkar tað ofta so nógv, at man hevur hug at gloyma raðfylgjuna í brúðarvísuni, segði hann.

Hetta skal sjálvandi takast við fyrivarni, men meiningin er greið.

## Traditiónir broytast

Viðvíkjandi trupulleikanum við, at tað eru ov fá, ið duga at kvøða við í brúðarvísuni helt hann, at hetta í stóran mun er tengt saman við, hvørja útbúgving fólk hava.

- Í einum góðum dansiumhvørvi er útbúvingin ikki so avgerandi, tí har duga fólk vanliga brúðarvísuna. Men eru fólk ikki von við eitt gott dansiumhvørvi, verða tað ofta akademikararnir, ið læra seg brúðarvísuna til høvið, segði Magnus Magnussen.

Hann kom eisini inn á stóra týdningin, ið hølini hava fyri brúðardansin.

- Eru hølini stór og aukustikkurin ringur, er ógjørligt at fáa dansin at ganga, staðfesti Magnus Magnussen.

Theodor E. D. Olsen, prestur, hugleiddi um meiri andaliga partin av brúdleypinum. Hann segði, at í einum brúdleypi krossast tað heilaga við tí verðsliga, og soleiðis eigur at vera.

- Traditiónirnar broytast við tíðini, og í dag er trendurin tann, at fólk giftast fyrr og fyrr upp á dagin. Tað er ikki óvanligt, at fólk giftast klokkan níggju fyrrapart fyri síðani at fara av landinum á brúdleypsferð, segði Theodor Olsen.

Eisini vindur tað meiri og meiri upp á seg, at fólk giftast til dømis klokkan 11 og hava síðani ein døgurða fyri teimum nærmastu.

Hann kom inn á upprunan til føroysku brúðarvísuna, »Várharra hann segði«, og greiddi frá, at Fuglaframi skrivaði út eina kapping um at skriva eina føroyska brúðarvísu í 1898. Eins og nú var eingin tá hildin at verða nóg góð, men Sverri Patursson eggjaði J. P. Gregoriussen, ið er yrkjarin til føroysku brúðarvísuna, til ikki at seta ljós sítt undir eina skjeppu.

Føroyska brúðarvísan bleiv so kvøðin á fyrsta sinni í 1901.

## Millum brúðarparið

Theodor Olsen segði eisini, at andaliga dimensiónin kom inn í brúdleypsveitsluna við brúðarvísuni.

Hann greiddi eisini frá sínum upplivingum í sambandi við brúðardans og kundi fortelja, at hann bæði hevði upplivað at verið kveistraður burtur frá brúðrini í brúðardansi og at verða tikin upp í millum brúður og brúðgóm.

Næstur í røðini var Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, sum hevði eitt sera skemtiligt innlegg.

Hann greiddi frá, at brúdleypssiðirnir eru broyttir nógv gjøgnum tíðirnar.

- Kærleikin hevur altíð verið har, men tað hevur ikki altíð verið kærleikin, ið var avgerandi fyri, hvør giftist hvørjum, segði Jóan Pauli Joensen.

Tað er kent, at summar bygdir vóru sonevndar nýggjársbygdir, meðan aðrar vóru jólabygdir. Tað merkti stutt sagt, at fólk hittust í hesum bygdum til dans á jólum ella á nýggjárinum.

- Hetta var heilt einfalt fyri at fólk skuldu hittast og finna sær maka. Fyrr var tað ein óskrivað lóg, at trímenningar ikki máttu giftast, og tí var hetta ein neyðugur siður, at fólk hittust á henda hátt, segði Jóan Pauli Joensen.

Hann samanbar hesi dansikvøldini við eitt nú ungdómsleguarnar, ið nú verða hildnar á Zarepta.



*Út við hundrað fólk høvdu leitað sær oman í Miðlahúsið í Vágsbotni til tiltakið hjá Sláið Ring, »Brúðardansur og brúdleypssiðir«*

*Mynd: Leo Poulsen*